**HANDILS LÆRLINGUR**
til Griffilin

Til handil okkara, ið selur alla skrivstovuútgerð og ymiskt annað, verður søkt verður eftir røskum, fyrikomandi lærlingi, sum dámar at hava nógv at gera...



Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so kom inn og tosa við Kára Justinussen.

griffilin
SMS • TEL 31 08 40








fk



**Heitlufts-aggregat til flest øll endamál**

- Refleks oljuovnar til bátin, summarhús o.a.
- Hoyggjturkarar til turkan av græsið - serframleitt til Føroysk viðurskifti!
- Gasovnar
- Hitakanónir
- Avfugtarir

*Vit útvega eftir tygara tørvi!*

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



**DAGFØR TEG HALT SOSIALIN**

Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum

# Tekna teg sum haldara, so fært tú sosialin 5 ferðir um vikuna til dyrnar

Tíðindablaðið
**sosialurin**
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin *ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

- ☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
- ☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
- ☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
- ☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
- ☐ Internet: 240,-/ársfj.



**Føroya størsta úrval av PAKKITILFARI**
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:

- Plastbakkar
- Pakkibond, tape
- Merkir, etikettir
- Knívar
- Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
- Ymisk tól til ídnaðin
- Reingerðisevnir
- Tilsetningsevnir
- Plattar
- Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

FARPACK
*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*



**LUTASEÐIL**



1. Toyota Corolla Hatchback (Frá Reyni Service) — virði 169.400 kr.
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm við frítíðaruppihaldi í 1 viku í Danland (Frá Smyril Line) — virði 15.000 kr.
3. Gávukort frá Th. Dam á Hálsi — virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Shell — virði 5.000 kr.
5. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
6. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
9. Apex ferðaseðil fyri 1 persón — virði 2.800 kr.
10. Føroyskt krov — virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 7. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 8. og 9. august 2000.
Eisini verða vinnaratølini løgd út á heimasíðu: www.sporthal.fo

Hestprent 314 555

STATOIL

Tórshavnar Ítróttarráð
2000 — 20 kr.



**BILLUTIR**
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666




**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: *www.sosialurin.fo*

# Kappróðurin gongur upp á stás

***Eystanstevnan:** Nýggi fasti starturin riggaði væl í fleiri kappingum, og líkindini á Skálafjørðinum vóru akkurát so góð, sum tey eisini vóru á norðoyarstevnu*



*Í fimm av seks kappingum var vinnarabáturin tann sami, sum hann var í Klaksvík fjúrtan dagar frammanundan. Einasta undantakið var í kappingini millum 10–mannafør*

***mynd: J. Jacobsen***

Fyrsta treytin, fyri at kappróðurin skal eydnast væl, er, at róðrarlíkindini eru góð. Í so máta hevur tað higartil gingið sera væl í róðrarárinum 2000.

Veðurvánirnar vóru ikki góðar alla síðstu viku, og tað kann væl hugsast, at døpru spádómarnir hava verið orsøk til, at fleiri, sum høvdu ætlanir um at koma aðra staðni frá og til Runavíkar at fylgja við í kappróðrinum, valdu at setast aftur. Tey, sum møttu á kappróðrarøkinum, fingu eina fína løtu. Veðrið var gott, og tað gekk skjótt og væl at avgreiða teir seks FM róðrarnar.

Ofta hevur verið tikið til, og vit hava eisini havt tað fleiri ferðir frammi í okkara kappróðrarfrásøgnum, at tað eigur at vera eitt mál at gera so skjótt av, sum tað á nakran hátt ber til, tá talan er um kappróður. Málið eigur at vera, at samlaða kappingartíðin skal fara niður um tveir tímar. Hetta eydnaðist ikki heilt leygardagin. Tað gingu knappir tveir og ein hálvur tími frá tí, at kappróðurin í skránni var ásetttur at byrja og inntil 10–mannaførini vóru komin á mál.

Men hetta var ikki so illa framfarið. Tað skal havast í huga, at tað varð kappast á øllum trimum teinunum – eitt túsund metrum, fimtan hundrað metrum og tvey túsund metrum.

Og tað skal ikki minst havast í huga, at Róðrarsambandið gjørdi fleiri royndir við nýggja fasta startinum. Vit umrøddu startin undan norðoyarstevnuróðrinum. Tá var ætlanin, at hesin starturin skuldi takast í brúk á norðoyarstevnu, men tað eydnaðist ikki. Í staðin fyri var starturin tikin í nýtslu í Runavík. Í flestu kappingunum varð fyrst skotið fyri at síggja, um tað riggaði hjá stýrimonnunum at loysa lítlu splittuna, og tað tóktist eydnast hampuliga væl.

### Somu vinnarar

Um kappróðurin skal vera áhugaverdur, so skal talan vera um kapping og spennandi kapping. Hvussu tað er við hesum eru tað bara manningarnar, sum ráða fyri. Vit kunnu bara staðfesta, at í kappingini síðsta leygardag gekk tað í næstan øllum róðrunum soleiðis, sum úrslitið í norðoyarstevnuróðrinum hevði lagt upp til.

Í fimm av seks kappingum var vinnarabáturin tann sami, sum hann var í Klaksvík fjúrtan dagar frammanundan.

Einasta undantakið var í kappingini millum 10–mannafør. Har eydnaðist tað nólsoyingum at vinna fyrsta sigurin síðani í 1991. At nýggi Vestmenningurin, sum vann á norðoyarstevnu, varð trokaður til síðis, og at Havnarbáturin var næstfremstur bæði í Klaksvík og í Runavík, boðar frá, at talan verður um stóra kapping millum 10–mannaførini í róðrunum, sum róðrarhugað framvegis eiga á.

Næsta FM kappingin verður longu komandi leygardag. Tá verður jóansøkukappróður í Vági. Tað serliga við tí róðrinum verður, at allar bátastøddirnar fara at kappast á eitt túsund metrum.

Annan leygardag verður Sundalagsstevnan í Kollafirði. Tá fer aftur at verða kappast á øllum trimum róðrarteinunum. Vestanstevnukappróðurin verður í Vestmanna leygardagin 15. juli. Tá fara allir bátarnir at kappast á eitt túsund metrum. Sætta og síðsta FM kappingin verður ólavsøkuaftan. Tá fer aftur bara at verða kappast á eitt túsund metrum.

## Eystanstevnan

*Kappróður: Bátarnir komu á mál í hesi raðfylgu í FM-róðrinum á Eystanstevnu*

**5-mannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Tjaldrið | 5.13,20 |
| 2 | Kollur | 5.25,02 |
| 3 | Drekin | 5.27,04 |
| 3 | Havfrúgvin | 5.27,04 |
| 5 | Sílið | 5.30,05 |
| 6 | Royndin Fríða | 5.33,14 |
| 7 | Spógvin | 5.35,00 |
| 8 | Báran | 5.39,01 |
| 9 | Blikur | 5.43,06 |
| 10 | Junkarin | 5.52,02 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 5.26,06 |
| 2 | Páll Fangi | 5.29,14 |
| 3 | Fuglfirðingur | 5.37,14 |
| 4 | Hvessingur | 5.37,23 |
| 5 | Gongurólvur | 5.38,00 |
| 6 | Sólmundur | 5.43,06 |
| 7 | Lómur | 5.45,23 |
| 8 | Riddarin | 5.53,04 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Frúgvin | 5.38,16 |
| 2 | Tjaldrið | 5.44,12 |
| 3 | Ørnin | 5.48,04 |
| 4 | Hvassi | 5.50,18 |
| 5 | Drekin | 5.51,07 |
| 6 | Sílið | 5.53,20 |
| 7 | Havfrúgvin | 5.55,13 |
| 8 | Beinta | 5.56,17 |
| 9 | Royndin Fríða | 5.57,15 |
| 10 | Súlan | 6.03,04 |
| 11 | Blikur | 6.04,02 |
| 12 | Firvaldur | 6.08,04 |
| 13 | Bylgjan | 6.09,08 |
| 14 | Spógvin | 6.10,02 |
| 15 | Dúgvan | 6.18,11 |
| 16 | Junkarin | 6.27,00 |

**6-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvessingur | 7.49,09 |
| 2 | Hósvíkingur | 7.52,21 |
| 3 | Strálan | 7.53,18 |
| 4 | Gongurólvur | 8.01,02 |
| 5 | Sólmundur | 8.02,04 |
| 6 | Kollfirðingur | 8.02,17 |
| 7 | Snopprikkur | 8.16,08 |

**8-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 7.33,24 |
| 2 | Toftabáturin | 7.38,02 |
| 3 | Gullbrandur | 7.42,00 |
| 4 | Nevið Reyða | 7.44,16 |
| 5 | Húsavíkingur | 7.49,60 |
| 6 | Miðvingur | 7.51,22 |
| 7 | Kvívíkingur | 7.52,00 |
| 8 | Oyndri | 7.54,11 |
| 9 | Knørrur | 8.04,05 |
| 10 | Heiðabáturin | 8.09,05 |

**10-mannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 9.39,09 |
| 2 | Havnarbáturin | 9.41,23 |
| 3 | Vestmenningur | 9.43,09 |
| 4 | Eysturoyingur | 9.50,22 |
| 5 | Vágbingur | 9.56,19 |
| 6 | Kjølur | ikki upplýst |